

**Dávid Isfeld**
*Hósvík*

# Spurningar til okkum øll

**Menniskjan og teldan – hvat meinar serfrøðin**

Hvat heldur læknaserfrøðin um ung fólk, serstakliga dreingir, sum spæla telduspøl fleiri tímar hvønn dag – hjá gentum er tað vanliga "chat" sum t.d. FaceBook? Er tað ikki ringt fyri heilsuna, bæði tí likamligu og tí sálarligu, at reaktivi parturin av heilanum í fleiri tímar hvønn dag koyrir við fullari ferð, meðan kroppurin situr mest sum pinnastillur? Er hendan ójavnvág av virkni millum heila og likam í lagi?

Royndir hjá foreldrum vísa, at børn í aldrinum uml. 4-12 ár verða bæði initiativleys og snarsint av at spæla telduspøl, Nintendo og tílík skerm-spøl. Mangan, tá børn eru koyrd út at spæla, eftir at hava spælt við skermspøl, vita tey als ikki, hvat tey skulu finna uppá (hetta sæst eisini hjá tannáringum). Onkuntíð finna tey sjálvsagt upp á okkurt, spæla fótbólt, krógva og blunda o.t., men alt ov ofta fara tey bert út fyri at fáa loyvi at koma inn aftur at spæla víðari við hesi skermspøl. Hesum havi eg royndir av við mínum børnum, eins og eg havi hoyrt somu hjartasuff frá næstan øllum foreldrum, sum eg havi tosað við um hetta; og tey eru nógv. Hvat halda foreldur, lærarar og sosiologar um hetta?

Onkur spyr óivað: Jamen hví skal hetta rópast ein trupuleiki? Tá tú sært fantasiloysi og initiativloysi í børnunum hjá tær annan hvønn dag ella meira, so er orsøk til at spyrja hvørji árin kunnu standast av hesum næstan katatoniska atburði hjá okkara børnum og ungdómi, sum ongantíð áður er sæddur í søgu menniskjans. Eisini er talan um ung vaksin, uml. 18-22 ár, sum spæla telduspøl næstan alla sína frítíð, heldur enn at nøra ein hvønn áhuga ella nøra eitt hvørt forvitni. Hvussu skal framtíðin verða skapt og ment? Hvussu verður almenna vitanin? Bert viðkomandi vitan fyri yrkisleiðini tykist at vera vird fyri mong ung. Forvitni, nýhugsan, áræði og virkisandi tykist vera minkandi. Eisini hava nogvir næmingar rættiliga vánalig bindindi til at arbeiða við eini ástøðiligari uppgávu. Spurningurin er hví so er. Um tað kann vera zap-mentanin: skjótu skiftini millum sjónvarpsrásir, stuttu prátini á netinum og fartelefonini, skjótu og stuttu vitjanirnar á ymisku heimasíðunum o.s.fr. Eigur slíkt ikki at verða tikið í ávísum álvara og tikið upp til kjak? Hvat halda politikarar og samfelagsfrøðingar um hetta?

**Les fjølbroytt og fá eitt sunt sinn**

Vit hava mangan hoyrt læknar siga "etið fjølbroytt", tá spurningurin um kost hevur verið frammið. Eg haldi, at hetta sanniliga eisini kann nýtast um okkara intelligens og medvit: Les fjølbroytt og leita fram fjølbroytta upplýsing, so tú fært breiða vitan og sostatt eitt sunt sinn. Ljóðar hetta ikki sum logikkur? Um tú vilt renna eina marathon, mást tú venja nógv; og venjingin er sjálvandi nógv renning. Um vit ynskja eitt vitanarsamfelag – gløggar borgarar, ið m.a. velja gløgt fólk á ting – er tað tá ikki upplagt at tosa meira og jaligari um vitan, og krevja størri politisk átøk til frama fyri fleiri útbúgvingarmøguleikar og betri dygd á skúlaøkinum sum heild? KVF er við at liva upp til sítt heiti og ábyrgd sum "public service" við sendingum sum Perspektiv, Skannarin, Eygsjón, Filosoffarnir, Álvaratos o.a.

Vit tosa nógv um likamliga heilsu. Vit skulu eta sunt og renna, svimja ella røra okkum á annan hátt, fyri at hava sunt likam, men vit tykjast ikki at vera serstakliga áhugagið í at gerast vitugari, klókari og víðka okkara sjónarring og sostatt gerast betri – betri til okkara yrki, men eisini betri sum menniskju og samfelagsborgarar, og vera kveikjarar og fyrimyndir fyri okkara børn.

**Lærdómur byrjar heima**

Tað er í lagi at tosa við matarborðið. Tað er hóast alt har, vit øll eru savnaði saman um nakað gott og hava møguleika at tosa saman og verða hoyrd – lurta, læra og luttaka. Aftan á døgurðan spjaðast vit í allar ættir. Við døgurðaborðið havi eg, sum smádrongur, hoyrt nógv áhugavert og kveikjandi, eisini okkurt stuttligt, og royni eg nú sjálvur at upplýsa og kveikja míni børn, og tey fáa høvi at siga sína hugsan og greiða frá onkrum, sum tey hava gjørt ella upplivað. Lærdómur byrjar hóast alt í heiminum, síðan kemur skúlin við í lærdómsleikin. At verða kallað/ur nørd ella strembari eigur ikki longur at tosa við børnini, læra og upplýsa tey? Tað kemst ikki av ongum, at lívið uttan fyri lærustovnarnar verður ikki kallað "lívsins skúli". Hvat lívsins skúli borðreiður við fyri børnini er í stóran mun ábyrgdin hjá foreldrunum, ikki so?

Hevur tað størri týdning at læra børnini at sita still og ikki at tosa við mat í munninum, enn tað hevur at tosa við børnini, læra og upplýsa tey? Tað kemst ikki av ongum, at lívið uttan fyri lærustovnarnar verður ikki kallað "lívsins skúli". Hvat lívsins skúli borðreiður við fyri børnini er í stóran mun ábyrgdin hjá foreldrunum, ikki so?

**Ein lítil niðurstøða**

Vit eru sjálv okkara bestu kritikarar, men tað krevur eitt greitt ynski um bata viðvíkjandi upplýsing og vitan. Eisini eiga vit at hava eitt vælmeinandi vaki eyga við okkara kæru eins og okkara medborgarar, soleiðis, at vit øll síggja hvør tørvur er til frama fyri vitanarsamfelagið og tess borgarar.



**Jógvan Sundstein**

# Er politiska skipanin við at fara í upploysn?

Tað at senda umboðan fyri fólkið til tings er aldargomul skipan. Føroyingar tóku hesa skipan við sær úr Noregi og kunnu tí við sínum fyrst Altingi seinri Løgtingi vísa á, at teir hava elsta parlamentið í Europa. Eina fólkaumboðan, sum hevur næstan 1200 ár á baki.

Grundleggjandi fyri hesa skipan var, at teir sum møttu á tingi umboðaðu alt landið. Sum øldir liðu, broyttust skipanin nakað, og ikki minst varð valdið hjá Løgtinginum nógv avmarkað, ja í nøkur ár í 1800 talinum var tingið heilt burtur. Men tað kom afturíaftur, hóast vit enn mangla endaliga suverinitetin.

Sum fráleið gjørdist siðvenjan, at fólkið beinleiðis valdi síni umboð við atkvøðugreiðslu. Men fast varð hildið við, at allir partar av landinum høvdu rætt til sína umboðan. Landið varð býtt upp í valdømir, og tá politiskir flokkar tóku seg upp, vórðu reglur gjørdar fyri, at teimum eisini vóru tryggjaðir umboðan. Um teir ikki megnaðu valdømisumboðan var møguleiki fyri útjavningarumboðan.

Hendan skipanin við bæði valdømis- og floksumboðan var galdandi til 2008, tá eitt "statskupp" varð gjørt. Í 2007, tá leið móti valinum í januar 2008, kom táverandi tingformaðurin við einum uppskoti um broyting av vallógini. Skotið varð upp, at Føroyar allar skuldu vera eitt valdømi. Samstundis sum reglurnar um persónligt atkvøðutal vórðu varðveittar. Týðuligt var, at hetta var persónligt áhugamál hjá tingformanninum. Men aðrir tingmenn høvdu eisini meira ella minni persónligan áhuga í, at skipanin varð broytt til eitt valdømi. Úrslitið varð, at í skundi og uttan serliga drúgva viðgerð varð uppskotið samtykt, og vit fingu nýggja skipan við einum valdømi á valinum 19. januar 2008.

Tað, tingmenn gloymdu og ikki góvu sær far um, var, at her broyttu teir fundamentalt alt grundstøði undir parlamentarisku skipanini. Í øllum londum er landsparta- og fólkaumboðanin grundleggjandi fyri samansetingina av parlamentinum. At so fleiri lond, har okkara er eitt av teimum, eisini hava eina politiskt demokratiska skipan, sum hevur við sær politiskt flokkabýti, tekur ikki burtur skipanina við landspartaumboðan.

Væl eru Føroyar eitt lítið land, ja vit kunnu siga sera lítið. Men harfyri eru tær eitt fjølbroytt land. Í mongum førum meiri fjølbroytt enn enn mong størri lond. Tí er tað avgerandi neyðugt, at umboðanin eisini er fjølbroytt. Røddunum alla staðni frá eiga at vera tryggjaðar afturljóð á tingi innan tað rímuliga mark, sum nú eina ferð er. Tað vil í hesum føri siga 33 umboð.

Nú er meginparturin av einum valskeiði farið, síðani nýskipanin fekk gildi. Og ikki kann sigast, at hon hevur hepnast væl. So smátt byrja fylgjurnar at síggjast. Sjálvt um økisumboðanin ikki broyttist so ógvuliga nógv við seinasta – og higartil einasta – val, so merkist longu á fyrstu uppstillingarfundum hjá ymsu flokkunum, at umstøðurnar eru øðrvísi. Serliga merkist tó í politiska arbeiðinum, bæði í Løgtinginum og landsstýrinum, men ikki minst innanhýsis í politisku flokkunum, at aðrar fortreytir eru galdandi. Faðirin at nýskipanini gongur á odda í persónsfikseringini og við atfinningum og beinleiðis álopum á samgonguna, sum hann formelt er partur av, men eisini á sín egna flokk og leiðara. Men hann hevur eisini fleiri fylgisneytar mestsum í øllum flokkum. Men hvussu skal tað annars kunna vera, tá bert ræður um at sleppa upp á ein (floks)lista og síðani sláast um persónligu atkvøðurnar. Úrslitið er: veikari flokkar, veikari lokal veljarafeløg, og ikki minst veikari politikkarar, serliga er og verður hetta galdandi fyri politiskar leiðarar. Fylgjurnar verða so víðari, at alt politiska arbeiði verður útvatnað og trupult verður at fáa nakrar loysnir, í øllum førum kemur nógv í drag.

Við einum valdømi kemur Løgtingið meiri og meiri at líkjast einm bý- ella bygdaráði. So fyri tann skuld er ikki neyðugt við einum kommunureformi. Vit leggja bara allar kommunurnar saman í eina. Harafturat fána flokkarnir burtur, og persónar kunnu stilla upp uttanflokkalistar, sum teimum lystir. Vit hava longu sæð ein persón rýma úr einum flokki og er fyribils uttanflokka tingmaður. Hann er so mikið sterkur, at hann ikki hevur havt trupulleikar við at útvega undirskrivtir til nýggjan flokk. Men um ikki tað var eydnast, kundi hann bara stilla upp uttanflokka. Tað fara helst aðrir at gera, um ikki hesu ferð, so seinri.

Fyri mær at síggja hevur núverandi valskipanin við sær, at øll politiska og parlamentariska skipanin fer í upploysn. Tað gangan neyvan meiri enn eini tvey valskeið fyrrenn hetta hendir. Einasta bjargingin er, at farið verður aftur til gomlu skipanina (við smávegis broytingum) beinanvegin, tað vil siga áðrenn komandi løgtingsval. Tað nyttar ikki at bíða til aftan á valið, tá er longu so nógv oyðilagt.

***Við vón um góðan bata***